## Atkvøðuseðlar vrakaðir

Valnevndin í Afghanistan kunngjørdi í morgun, at hon hevur ógildað umleið 200.000 atkvøðuseðlar frá forsetavalinum tann 20. august. Tað hava verið fleiri skuldsetingar um valsvik, og valevndin hevur fingið meiri enn 2.000 klagur, skrivar Reuters úr Kabul. Millum annað verður sagt, at á fleiri valstøðum vóðru nógvir atkvøðuseðlar koyrdir í atkvøðukassarnar, áðrenn valhølini lótu upp. Valnevndin hevur eisini ásannað, at alt ruggaði ikki rætt. Millum annað hevur nevndin sagt, at á summum valstøðum vóru fleiri atkvøður enn veljarar.



## Kennedy sigur nei

Joseph P. Kennedy, sum er bróðursonur Edward Kennedy, ið doyði fyri stuttum, vil ikki taka við sum senatorur eftir farbróðurin. Tann 56 ára gamli Joseph P. Kennedy er sonur Robert Kennedy. Joseph hevur sitið í Umboðsmannatinginum í mong ár, og roknað varð við, at hann fór at seta seg í senatssessin, sum Kennedy-ættin hevur havt í meiri enn 50 ár. Men í gjár kunngjørdi Joseph P. Kennedy, at hann tekur ikki av tilboðnum. Edward kennedy umboðaði statin Massachusetts, og eftirmaðurin skal veljast á einum servali, sum verður tann 19. januar.

# Guds útvaldu taka l

**- Barack Obama er ein vandamikil maður, sum hevur innført ein anti-ísraelskan politikk. Fremsta uppgávan hjá ísraelsku stjórnini er nú at ignorera altjóða trýst og verja landið, sum Gud gav Ábrahami. Tað segði ortodoksi jødin Motti Isaak, sum í gjárkvøldið hevði fyrilestur í Miðlahúsinum um jødisku búsetingarrørsluna á Vestara áarbakka. Frið við fíggindan trýr hann ikki uppá**

ÍSRAEL

*Heini í Skorini*
*Heini_skorini@yahoo.com*



*- Alt prát um eina friðaravtalu og ein palestinskan stat undir liðini á Ísrael er óaktuelt og veruleikafjart. Tað ber ikki til at fáa frið í lag, tá grannin hevur valt kríggj. Tað besta, Ísrael kann gera, er at berjast ímóti yvirgangi og royna at halda tørn yvirfyri útlendskum trýsti. Tað segði 57 ára gamli ortodoksi jødin Motti Isaak í Miðlahúsinum í gjárkvøldið*

- Ein samling av gomlum zionistum, sigur hann og smílist, so eyguni krympast.

Brosjan við føroyska og ísraelska flagginum situr stútt í bringuni, og Óli Breckmann er, eins og undirritaði, komin oman í Miðlahúsið hetta myrka og hálvkalda mánakvøldið at lurta eftir ortodoksa jødanum Motti Isaak. Áðrenn tiltakið byrjar, fái eg sjálvur eina brosju frá fryntliga formanninum í "Vinafelagnum Føroyar-Ísrael", sum er ein samanlegging av tveimum føroyskum ísraelsfeløgum. Nýggja brosja mín fer í lumman, í øllum førum í fyrstu atløgu.

Høgi og vælformuleraði Motti Isaak, sum er 57 ára gamal við gráum fullskeggi og eyðkenda jødiska kalottinum á høvdinum, hevur meginpartin av sínum lívi verið ein sentral persónligheit í sokallaðu jødisku búsetingarrørsluni. Ein átrúnaðarlig og politisk rørsla, hvørs endamál er at byggja og útbyggja jødiskar bygdir og býir á Vestara áarbakka, sum Ísrael hersetti frá Jordan í 1967 "við Guds hjálp", sum Motti tekur til.

> *- Barack Obama hevur innført ein anti-ísraelskan politikk og roynir at trýsta ísraelsku stjórnina til meira eftirlæti*

Sambært fjølmentum ST-resolutiónum skal Vestari áarbakki vera komandi heimstaðurin hjá tí statsleysa palestinska fólkinum, tá stríðandi partarnir ein fagran dag undirskriva eina friðaravtalu. Og tí er jødiska búsetingarrørslan ein umstrídd og hatað rørslað, bæði av ísraelska vinstravonginum og av stórum pørtum av vesturheiminum. Bæði ST, ES og enntá besti vinur ísraels, USA, hava samtykt og ferð eftir ferð givið til kennar, at vøksturin av jødiskum búsetingum á hersettari arabiskari jørð er ólógligur og undirgrevur ísraelsku-arabisku friðargongdina.

### Hussein Obama

Men Motti Isaak leggur líka í ávarandi peikifingrar frá bæði Barack Obama og Hillary Clinton, sum hava hvest retorikkin yvirfyri Ísrael samanborið við fyrrverandi forsetan, George W. Bush. Judea og Samaria, sum eru bíbilsku nøvnini fyri Vestara áarbakka, er sambært ortodoksum jødadómi jørð, sum Gud hevur ognað jødiska fólkinum. Og tí hava Motti Isaak og vinir hansara í fjøllunum eystanvert Jerusalem guddómligan rætt til at liva í økinum uttan mun til, hvat altjóða samfelagið og fjølmentar ST-resolutiónir hava at siga um málið.

- George W. Bush er ein trúgvandi maður, sum lesur bíbliuna, og sum tí veit, hvat vit jødar gera í Samaria og Judea. Men tað veit Barack Obama ikki. Hann hevur innført ein anti-ísraelskan politikk og roynir at trýsta ísraelsku stjórnina